# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

17. mai fingu Sólfríð Hansen og Magnus Brahé Jørgensen, Hoyvík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4100 gr.

21. mai fingu Elin Hammer og Jákup Vágsheyg, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3450 gr.

23. mai fingu Annika og Atle Leitisstein, Runavík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2315 gr.

23. mai fingu Linda Joensen og Jan Petersen, Oyrarbakka, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3500 gr.

23. mai fingu Siri Ósá og Dan Sjóstein, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

23. mai fingu Tórun Sørensen og Niels Magnussen, Øravík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3650 gr.

26. mai fingu Nomi og Stig Thomassen, Miðvági, tvíburðar, gentur. Onnur var 52 cm long og vigaði 3200 gr, hin 53 cm og vigaði 3250 gr.

26. mai fingu Mariann og Jan Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

26. mai fingu Barbara Poulsen og Hallur Djurhuus, Hoyvík, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4600 gr.

26. mai fingu Gunnvá Bærentsen og Bill Mc.Leod Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4200 gr.

26. mai fingu Marsanna Eikhólm og Trygvi K. Joensen, Hvalvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

28. mai fingu Eyðgerð og Petur Eli Niclasen, Miðvági, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4000 gr.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá systir okkara

**Ida Oliva Nysted**
fødd Mikkelsen, Klaksvík

andaðist og varð jarðað.

**Systkini**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi tá ið kæri sonur og beiggi okkara

**Hellvin Randrup**

so brádliga fór frá okkum.

Takk fyri blómur og kransar og tøkk fyri gávur til kirkjuna og tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Bjarma og Jóhan**

## Eliesar Hammer deyður



17. mai andaðist Eliesar Hammer á Eiði, 90 ára gamal. Millum manna var hann nevndur Issa. Foreldrini Elin Petrina og Jógvan Hammer vóru bæði eiðisfólk. Hann var giftur við Lisu, sum eisini var av Eiði. Hon var dóttir Onnu Suffíu, f. Højsted, og Jóan Petur Ellingsgaard.

Lisa og Issa búsettust á Eiði og fingu 3 børn:

Jógvan er giftur við Lis Djurhuus, og tey búgva í Havn.

Anna er gift við Inga Mohr, og eisini tey búgva í Havn.

Elin giftist í 1977 við Eilif Nielsen í Klaksvík. Hon doyði í 1993.

Lisa doyði í fjør, 87 ára gomul.

Ein stóran part av lívinum var Issa sjómaður. Hann fór til skips 16 ára gamal í 1928. Fyrsti túrurin var við Keflavík við Óla Max í Vík sum skipara.

Í 1930 fór Issa við Vikholm, sum Jens Evensen í Havn átti, men tað bleiv bara til ein suðurlandstúr, tí skipið var so kavrotið, at tað varð lagt, tá teir komu aftur.

Sama árið fór hann við Gefion til Grønlands. Knút Petur Jacobsen av Eiði var skipari. Teir høvdu eina ógvuliga ringa heimferð. Teir fóru úr Føroyingahavnini 1. september og komu ikki á Eiðisflógva fyrr enn á Mikkjalsmessu. Tá høvdu teir eisini ligið bakk í 10 dagar vestur ímóti Amerika.

Í 1932 fór hann við Svínoynni. Skipari var Jákup hjá Jensi á Viðareiði. Í 1938 fór hann við Esther hjá Seglhúsmonnunum í Klaksvík, og í 1941 var hann við Stella Argus hjá Pf. Kimbli í Havn. Á veg heim úr Fleetwood vórðu teir álopnir av týskum flogfari, sum skeyt eftir teimum og bumbaði. Kúlurnar raktu trolaran, men ongin mnasskaði hendi. Issa var eisini við øðrum skipum.

Hann fór so við Dragaberg, sum Kjølbro átti, og Kaj Johannesen førdi. Eftir tað sigldi hann við trolarum, sum Kaj hjá Mortani førdi. Hann sigldi eisini eina tíð við Hans Paula Johannesen. Sín seinasta túr var Issa við Enniberg, sum Mortan, sonur Kaj, eigur.

Issa var tó ikki á sjónum alla sína tíð. Hann arbeiddi í eini 20 ár á flakavirkinum Norðís.

Maður, sum hevur siglt so nógv sum Issa, kemur út fyri so mongum. Einaferð, í 1962, var hann við Skálabergi, tá teir komu í eina ódn. Teir lógu bakk í fýra samdøgur. Meðan øll manningin var har afturi í skipinum, var Issa einsamallur har frammi í tvey samdøgur uttan mat. Tað var ikki hugsingur um hjá honum at koma aftur til hinar.

## Harley Davidson á Føroya Barnaheimi




*Ove Ritter í Havn samskipaði tiltakið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin, 29. mai Kristi himmalferðardag, vóru nógv fólk savnaði á Føroya Barnaheimi í Havn til eitt serligt tiltak. Har var opið hús í sambandi við at luttakarar á "North Atlantic Motorsycle Rally" úr Svøríki, Danmark og Føroyum komu við sínum motorsúkklum og handaðu gávur til barnaheimið.

Vanligt er Harley Davidson felagsskapir gera nakað fyri børn. Umframt at Føroya Barnaheim fekk 40.000 krónur og eitt myndatól (virði 5.000 kr), fingu børnini Harley Davinson klæðir, skriviamboð og ymisk annað.

Teir umleið 20 motorsúkklistarir, sum komu við Norrønu seinasta mánadag, fóru avstað aftur fríggjamorgunin. Teir høvdu ymisk tiltøk kring landið, sum øll vóru væl vitjað. Ove Ritter í Havn samskipaði tiltøkini.

## Andlát

22. mai
Magnhild Hermansen, Hósvík, 88 ár

23. mai
Trinemia Sigurðsson, Klaksvík, 87 ár

27. mai
Paulina Jensen, Skúgvi, 82 ár

28. mai
Tórur Mortensen, Tvøroyri, 83 ár
Anker Petersen, Saltangará, 77 ár
Peta Johansen, Streymnes, 75 ár
Poula Christiansen, Havn, ættað úr Leirvík, 76 ár
Kristina Djurhuus, fødd Guttesen, Havn, 80 ár
Petur Emil Christiansen, Leirvík, 81 ár



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 100 ára føðingadagur á Lágargarði



*Anfinn Kallsberg løgmaður heilsar her upp á Margrethu Egholm*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagin 28. mai varð stórt hátíðarhald á Lágargarði í Havn. Eitt av búfólkunum, Margretha Egholm úr Havn, fylti 100 ár. Føðingardagurin var frá kl. 15 og 18. Umleið 250 fólk komu á gátt hendan dagin. Millum tey vitjandi vóru Birgit Kleis ríkisumboð, Anfinn Kallsberg løgmaður og Jan Christiansen borgarstjóri. Páll á Reynatúgvu landsstýrimaður og Petra Johnsdóttir Joensen almannastjóri hildu talu.

## 15 sjúkraróktarfrøðingar fingið prógv

*Mikudagin 28. mai 2003 var samkoma í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, tá 15 sjúkrasystralesandi fingu handað prógv á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. Fremsta rað f.v. Katrine Klein Arnbjerg, Tórshavn, Annika Háberg, Tórshavn, Halla Seyer Hansen, Tórshavn, Maud Hansen, Syðrugøta, Asbjørg S. Jacobsen, Tórshavn,Lydia Jacobsen, Norðragøta. Aftara rað f.v Ella Guldbro Joensen, Leirvík, Kitty Jóhanna Johannessen, Rituvík, Leila Eyðfríð Lisberg, Vágur, Rannvá Lydersen, Hvannasund, Gunnvá Müller, Klaksvík, Signhild Finnsdóttir Nybo, Tórshavn, Jensia H. Petersen, Tórshavn, Evi Poulsen, Tórshavn, Joan Skorheim, Tórshavn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



## Martin Rasmusen 60 ár



Leygardagin 31. mai verður Martin Rasmussen á Strondum 60 ár. Martin er føddur og uppvaksin í Klaksvík, sonur Olevinu, f. Hendriksen, og Dia Rasmussen, bæði av Kirkju, men búsettust í Klaksvík. Martin lærdi til radiomekanikara hjá Corona Radio í Klaksvík og arbeiddi har í tilsamans átta ár. Í februar 1971 fekk hann starv á transmissiónsdeildini hjá Telefonverki Føroya Løgtings í Havn. Hann er enn í sama starvi hjá Føroya Tele. Martin eigur tríggjar synir. Seinastu tvey árini hevur hann búð á Strondum. Føðingardagin er hann burturstaddur.

## Durita Weber - Ph.D. í medicin



9. mai 2003 vardi Durita Weber, f. Poulsen, í Odense sína Ph.D.-ritgerð um blóðkrabba (leukæmi). Durita hevur gjørt eitt slóðbrótandi arbeiði innan granskingav blóðkrabba. Hon hevur m.a. kannað hvussu blóðkyknurnar búnast í blóðinum. Kanningarnar hava verið gjørdar bæði í kroppinum og sum laboratorieroyndir.

Durita er dóttir Elin, f. Magnussen, og Høgna Poulsen í Havn. Hon búði í Miðvági, til honvarð 11 ára gomul. Tá flutti familjan til Havnar at búgva. Pápin var prestur. Tá Durita var liðug sum studentur í Hoydølum, fór hon í 1985 til Danmarkar at lesa til lækna á Universitetssjúkrahúsinum í Odense. Meðan hon las, tók hon Diplomprógv í medisinskari gransking. Í 1994 fekk hon læknavísundaligt embætisprógv.

Í 1994 byrjaði hon sín Ph.D-lestur. Lesturin varð longdur vegna eyka laboratoriekanningar, sum tóku tíð at gjøgnumføra, og tí hon varð við barn tríggjar ferðir.

9. mai í ár vardi hon so sína Ph.D.-ritgerð við sera góðum úrsliti. Durita er gift við Claus Weber, ættaður úr Ålborg, hann er útbúgvin eksportteknikari, tey búgva í Odense og eiga døturnar, Emmu, Juliu og Sáru.

## 80 ár

Í morgin, 1. juni, fyllir Elsebeth (Ebba) Jacobsen, í Miðvági, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## 75 ár

Í dag, 31. mai, verður Borghild Eystberg, Skopun, 75 ár.

## Dagurin

**31. mai. Petronella,** deyð umleið ár 100. Ein kend halgikona í fornkirkjuni. Halgisøgan sigur, at hon var dóttir Pætur ápostul, men tað skal helst skiljast sum andaliga dóttir hansara.

Juni
Juni hevur navnið eftir rómversku gudinnuni Juno, sum var kona Jupiters, ið var høvuðsguðurin hjá rómverjum.

**1. juni. Nikodemus,** deyður í umleið 300. Rómverskur borgari, ið gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum.

**2. juni. Marcellinus,** prestur í Róm, sum varð hálshøgdur í umleið 300.